## Terassa á Café Natúr

Tað vindur alt meiri og meiri upp á seg at cafeir og barrir útbyggja við einari terassu. Tað byrjaði við Hvonn, helt fram við Cafe Vágsbotn, sum er ein úticafe burtur av, síðani kom Patio og Mica, og nú fylgir so eisini Cafe Natúr við. Har verður í løtuni arbeitt við at gera eina terassu oman móti Kongabrúnni. Ein orsøk til at tað er vorðið so vælumtókt við terassum á líkum støðum er uttan iva, at tað ikki longur er loyvt at roykja inni á almennum støðum. Men ein onnur orsøk er allarhelst eisini, at cafementanin í Føroyum er um at broytast. Ætlanin er, at fólk kunnu sita úti á Cafe Natúr til ólavsøku.




## Flogfar dottið niður í Iran

Eitt iranskt flogfar við 168 fólkum umborð er dottið niður í Iran. Roknað verður við, at øll umborðverandi eru deyð, skrivar Reuters. Talan var um 153 ferðafólk og 15 starvsfólk. Flogfarið er dottið niður nærhendis býnum Qazvin í ein landnyrðing úr høvuðsstaðnum Teheran. Flogfarið var á veg úr Teheran til armenska høvuðsstaðin Jerevan, tá tað datt niður.

# Høgni Hoydal vil ikki rinda prísin fyri valdið

**Formaðurin í Tjóðveldi noktar at góðtaka lógarbrot fyri at sleppa aftur í samgongu**

SAMGONGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Skal tað verða ein treyt fyri at koma aftur í Samgongu, at vit skulu góðtaka lógarbrot, so gerst ikki við, tí so eru vit ikki við meiri, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi*

- Skal prísurin fyri at sleppa aftur í samgongu vera tann, at vit skulu góðtaka lógarbrot, so gerst ikki við.

Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldi, er eitt sindur illa við av útsøgnini hjá fráfarna landsstýrismanninum, Hans Paula Strøm, í Sosialinum í gjár.

Tað var Tjóðveldið, sum klagaði Hans Paula Strøm fyri landsstýrismálanevndini fyri at hava brúkt pening í heilsuverkinum, uttan at Løgtingið hevði játtað hann frammanundan.

Tað endaði við, at landsstýrismaðurin legði frá sær í fyrradagin.

Men Hans Pauli Strøm duldi ikki fyri, at hann føldi seg hunddálkaðan av Tjóðveldinum og at tað eftir hanara tykki var ein beinleiðis heksajagt, sum at enda fekk hann at leggja frá sær.

Hann er eisini sannførdur um, at við hesari framferðini hevur Tjóðveldið forkomið sær møguleikan at sleppa aftur í samgongu. Í øllum førum dugur hann ikki at síggja, hvussu Javnaðarflokkurin aftur kann samstarva við Tjóðveldið. Og yvirhøvur metir hann, at eisini í øðrum flokkum hevur illviljin ímóti Tjóðveldinum ongantíð verið størri enn nú.

### Gerst ikki við

Hetta skilir Høgni Hoydal slett ikki.

Hann fær seg illani at trúgva, at tað skal vera ein treyt, at ein flokkur skal vera til reiðar at góðtaka lógarbrot fyri at sleppa við í eina samgongu og fáa politiska ávirkan.

- Men er prísurin fyri at sleppa í samgongu, at vit skulu góðtaka lógarbrot, so gerst ikki við og so mugu vit bara sita uttanfyri.

- So eru vit ikki við, leggur hann afturat.

Hann heldur, at eftir útsøgnini hjá Hans Paula Strøm og øðrum politikarum, er boðskapurin, at treytin fyri at vera við í samgongu, er at tað skal góðtakast, at lóg og landaskil ikki verður hildið.

- Hetta vísir rættiliga væl, hvør hugburður ræður, leggur Høgni Hoydal afturat.

### Góðtaka ikki maktmisbrúk

Hann sigur, at tær samgongur, sum eru slitnaðar við Tjóðveldinum upp í, eru slitnaðar tí at hinir samgonguflokkarnir hava misbrúkt sítt vald og tað góðtekur Tjóðveldið ikki.

Hann sipar til CHE samgonguna, sum alment slitnaði av gásagøluni í Tinganesi og í 2004 slitnaði sjálvstýrissamgongan í kjalarvørrinum á bókini "Skjót journalistin", sum var atfinningarsom ímóti Anfinni Kallsberg, løgmanni. Tjóðveldið tók ákærurnar í bókini til sín og kravdi løgmanneftireinifrágreiðing, men tað endaði alt samalt við, at Anfinn Kallsberg segði øllum landsstýrisfólkunum hjá Tjóðveldinum upp.

- Tær samgongur, sum eru slitnaðar og sum vit hava verið í, eru slitnaðar, tí at vit hava ikki góðtikið rossahandlar og maktmisbrúk og skal tað vera prísurin fyri at sleppa í samgongu, eru vit ikki við meir.

- Skulu vit hava eina stjórn, sum ikki heldur landsins lógir, hava vit ikki eitt fólkastýri sum virkar og tað sigur rættiliga nógv um ráðandi hugburðin í øðrum flokkum.

- Vit hava eisini kravt, at kanningar og frágreiðingar, sum hava staðfest, at landsstýrisfólk hava borið seg skeivt at, fáa avleiðingar og tað hava tær eisini fingið, tí landsstýrismenn eru farnir frá.

### Verða hildin uttanfyri

Kortini heldur Høgni Hoydal, at tað er nakað í útsøgnini hjá Hans Paula Strøm um at halda Tjóðveldið uttanfyri ávirkan.

Eftir hansara tykki er tað tilvitað hjá øðrum flokkum at halda Tjóðveldið uttanfyri ávirkan.

- Tað gongur sjón fyri søgn, at vit verða hildin uttanfyri politiska ávirkan, tí at vit hava hildið fast um nakrar grundreglur.

- Men vit eru bara ikki við upp á at bróta tær grundreglurnar um at halda lóg og landaskil.

At tað ikki er ein grundregla hjá øllum flokkum, heldur hann, sigur rættiliga nógv um, hvagar føroyska fólkastýrið nú er komið.

Vit hava meiri um málið aðrastaðni í blaðnum

## Hava ikki jagstrað Hans Paula

**Meirnýtslan hjá Hans Paula Strøm var av einum heilt serligum slagi og tí kundu vit ikki sita tigandi og hyggja at, sigur Høgni Hoydal**

MEIRNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tá ið vit hava kravt, at Hans Pauli Strøm skuldi leggja frá sær, hevur tað als onki fyri heksajagt ella forfylging at gera.

Tað er annars kenslan, sum Hans Pauli Strøm, fyrrverandi landsstýrismaður, situr eftir við, eftir at hann noyddust at leggja frá sær.

Meirnýtslan hjá Hans Paula Strøm var av heilt serligum slagi, tí hon var so stór og hon varð miðvís og skipað ár um ár, sigur Høgni Hoydal.

Ímeðan vit sótu í CHE samgonguni, heittu vit fleiri ferðir á Hans Paula Strøm um at fáa tamarhald á peninganýtsluni í heilsuverkinum, annars endaði tað við, at hann varð tvingaður at leggja frá sær.

Men Høgni Hoydal sigur, at meirnýtslan helt bara fram.

- Hóast Hans Pauli Strøm hevur gingið allar eykajáttanir, hann hevur biðið um, helt hann fram at brúka pengar, sum ikki vóru játtaðir.

- Málið er reist tí at bæði landsgrannskoðarinogløgtingsgrannskoðararnir hava víst á tað.

- Og tá ið so løgmaður eisini sveik sína eftirlitskyldu, var onki hjá okkum at gera enn at taka málið upp, sigur Høgni Hoydal.

- Tá ið Hans Pauli Strøm kallar hetta bara hunddálking, er hetta bara ein roynd at flyta tankarnar frá veruliga trupulleikanum, men tað er ússaligt at leggjast eftir boðberanum, heldur enn trupulleikanum.

Vit hava meiri um málið aðrastaðni í blaðnum.